almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo



# LEIÐARI
## til veitingardeildina

**Vit bjóða tær eitt spennandi, avbjóðandi og sera fjølbroytt starv, har tú fært møguleika at verða við í framhaldandi menningini av Almannastovuni.**

*Starvið verður sett skjótast gjørligt ella eftir nærri avtalu*

Leiðarin á Veitingardeildini hevur fingið aðrar avbjóðingar á Almannastovuni, og tí søkja vit eftir nýggjum leiðara til Veitingardeildina.

Sum leiðari fyri Veitingardeildini hevur tú ábyrgdina av øllum veitingum innan fólkapensjón, fyritíðarpensjón, dagpening, barnapening og stuðul til uppihaldspening v.m. Hartil hevur tú ábyrgdina av menningini av starvsfólkunum á deildini.

### Deildin
Vetingardeildin er í dag mannað við tveimum fulltrúum og nýggju málsviðgerum umframt leiðara. Deildin umsitur fyri í alt umleið 660 mió. kr. árliga og er tann deildin á Almannastovuni, sum umsitur flestar veitingar. Almannastovan umsitur fyri í alt umleið 900 mió. kr. árliga.

### Høvuðsuppgávurnar eru
- Leiða og fordeila arbeiðið á deildini
- At arbeiðið er skipað soleiðis, at allar veitingar eru í samsvar við lógir og reglur á økinum
- At deildin er í støðugari menning
- At deildin hevur starvsfólk, ið hava fakligan førleika at eftirkanna, útgjalda og viðlíkahalda allar veitingar og førleikan at ráðgeva øðrum deildum
- At starvsfólk trívast, mennast og verða stuðlað og eggjað til størri sjálvstøðu, sjálvræði og ábyrgd í arbeiðinum
- At tryggja eitt alsamt betri samskifti millum deildir og fakbólkar á stovninum og harvið menna tvørfakligt samstarv
- Avgerðarskyldu í málum, har starvsfólkini á deildini ikki hava heimild
- Samskifta við aðrar deildir/deildarleiðarar á stovninum
- Í samráði við stjóran at seta/uppsiga starvsfólk
- Kunna stjóran um ivaspurningar í sambandi við málsviðgerðina
- Upplýsing til aðrar stovnar og feløg

### Førleikakrøv
Umsøkjarin skal helst hava útbúgving innan fíggjarliga økið frá hægri lærustovni, – hetta er tó eingin treyt.

### Arbeiðsroyndir
- Hollar arbeiðsroyndir frá privatari ella almennari umsiting
- Evni at seta í verk fyriskipanir
- Evni at eggja og menna starvsfólk
- Góð samstarvsevnir
- Góð evnir at orða seg munnliga og skrivliga
- Góðan kunnleika til kunningartøkni
- Leiðsluroyndir og kunnleiki til almannaverkið er ein fyrimunur, men eingin treyt

### Vit kunnu bjóða
- Starv í einum spennandi umhvørvi í støðugari menning við nógvum og fjølbroyttum avbjóðingum
- Starv við møguleika fyri persónligari og fakligari menning
- Starv í einum góðum arbeiðsumhvørvi, har dentur verður lagdur á tað einstaka starvsfólkið.

### Lønar- og setanarviðurskifti
Starvið verður sett skjótast gjørligt ella eftir nærri avtalu. Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

### Nærri upplýsingar
Nærri upplýsingar fást við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra, á tel. 353510, ella 215480 og Tummas Djurhuus, deildarleiðara, á tel. 353510, ella 215476.

### Umsóknarfreist
Umsóknir við avriti av prógvum o.ø. skulu vera Almannastovuni, Smyrilsvegur 20, Postboks 3096, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 21. september 2007, kl. 12.

KREA.FO